# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gevið fótbóltsvenjarunum rætt

Tað er greið tala, sum Kurt Mørkøre hevur í blaðnum í dag. Fyrrverandi landsliðskempan, sum nú virkar sum venjari, vil hava skipað viðurskifti at galda á arbeiðsmarknaðinum hjá fótbóltsvenjarum.

Talan er um sjálvsagdan rætt. At talan er um eina risiko við venjarasetan, hevur einki við spurningin um trygd at gera. Vilja vit hava venjarar, sum veruliga kunnu lyfta støðið á føroyskum fótbólti, so skulu hesir eisini hava umstøður til tað. Tað vil siga, at teir meira ella minni mugu fáa møguleika at hugsa um fótbólt burturav. Men skulu teir tað, so er eisini neyðugt, at fíggjarliga trygdarnetið er til staðar.

Spælarar og dómarar hava seinnu árini fingið greiðar reglur um síni rættindi. Enn standa venjararnir tó við ongum í so máta. Kanska tí teir í veruleikanum eru ein somikið veikur bólkur. Við kravinum um útbúgving standa venjararnir tó munandi sterkari í dag, enn teir hava gjørt, og fyri at verja fakliga støðið innan yrkið er tí púrasta sjálvsagt, at greiðar treytir verða setta mótvegis arbeiðsgevarunum.

Lutfalsliga munnu føroysku feløgini fara at nærkast heimsmetinum, tá talan er um venjarauppsagnir. Og tað er ikki víst, at nýggjar og greiðar spælireglur í sjálvum særn broyta hetta. Men tær kunnu tryggja, at feløgini eisini mugu hugsa um avleiðingarnar av sínum gerum, tá stigið verður tikið.

**Sosialurin**

## Gott at Tóri ikki er lækni

**HELGI ABRAHAMSEN**



“Gott at Helgi ikki er lækni” stendur sum yvirskrift yvir eini grein, sum formaðurin í “Ungum fyri Miðflokkin”, Tóri Højgaard, hevði í bløðunum í farnu viku. Lat meg siga beinan vegin, at eg eri púra samdur við yvirskriftini.

Men tíverri byggir Tóri greinina á fleiri misskiljingar, sum eg tí verði noyddur at rætta.

**Misskiljing 1**

Greinin byrjar við orðunum: “Helgi Abrahamsen roynir í einum lesarabrævi enn einaferð at ræða okkum frá at hugsa tankan, at vit ein dag kunnu gera okkum leysar av blokkstuðlinum.”

Hetta er ein stór misskiljing. Eg stúri als ikki fyri tí degi, tá inntøkurnar, sum vit sjálvi skapa til samfelagið, verða minst líka stórar sum útreiðslurnar. Tvørturímóti, so haldi eg, at vit eiga at gera alt sum vit kunnu, fyri at styrkja um inntøkugrundarlagið undir føroyska samfelagnum.

Tað sum eg harafturímóti havi ávarað ímóti, er at tveita blokkstuðulin burtur, áðrenn vit hava funnið nakað annað inntøkugrundarlag at seta ístaðin.

**Misskiljing 2**

Tóri sigur seg vera samdan við mær, um at skattabyrðan hevði vaksið munandi, um blokkstuðulin bleiv burtur eftir einum degi, men hann heldur tó, at støðan hevði verið ein onnur, um hetta hendi líðandi yvir eitt longri tíðarskeið.

Hetta er eisini ein misskiljing. Um vit missa blokkstuðulin frá einum degi til annan, ella tað hendir líðandi yvir fleiri ár, tað í sær sjálvum broytir ikki upphæddina, sum vit missa, og sum skattgjaldarin má rinda. Tað einasta sum broytist, er at við eini longri skiftistíð kunnu tit lumpa fólk til at taka undir við loysingini, tí tá síggja tey ikki avleiðingarnar, fyrr enn skaðin er hendur.

**Misskiljing 3**

Tóri sigur víðari: “Helgi vil við lesarabrævi sínum ræða Føroya fólk til at halda, at Miðflokkurin vil hava blokkin at hvørva eftir stuttari tíð, men hetta er als ikki so”.

Her hevur onkur misskilt okkurt, tí í februar hevði Karsten Hansen tíðindafund, har hann boðaði frá, at hann fór í Miðflokkin, og ein av grundgevingunum var, at Miðflokkurin hevði sama politikk á ríkisrættarliga økinum sum Karsten sjálvur. Og Karsten hevur mangan sagt, at hann vil hava blokkin burtur “í dag heldur enn í morgin”.

**Søgan um sjúklingin**

Tóri brúkar síðani eina mynd av einum sjúklingi, sum er við at koma fyri seg, og tí noyðist læknin at taka tann vanabindandi heilivágin frá honum. Sjúklingurin er Føroyar og heilivágurin er blokkstuðulin.

Fyri at siga tað sum tað er, so dámar mær ikki at samanbera Føroyar við ein ússaligan sjúkling, sum livir av heilivági, tí eg haldi at vit hava eitt gott land at liva í. Men um eg kortini skal halda fast við myndina hjá Tóra, so eri eg samdur í tí, at tað er altíð rætt at taka heilivágin frá sjúklinginum, tá hann er komin fyri seg. Men samtíðis vil eg undirstrika, at tað er umráðandi at tryggja, at sjúklingurin veruliga er blivin frískur og kann liva uttan heilivág, áðrenn heilivágurin verður tikin frá honum, tí annars doyr hann.

Har er tað, at eg havi víst á, at meðan loysingarflokkarnir fegnast um, at “heilivágurin verður trappaður niður”, so er sjúklingurin als ikki komin á føtur. Heilivágurin er til fyri at gera sjúklingin frískan, og tí mugu vit ikki rokna við, at sjúklingurin blívur frískur av at missa heilivágin. Tað er munurin millum mína og tykkara uppfatan av blokkstuðlinum.

Tóri brúkti yvirskriftina “Gott at Helgi ikki er lækni”. Men eftir at hava lisið hasa samanberingina havi eg hug at siga, at kanska er tað eisini gott, at Tóri heldur ikki er lækni!

## Løgtingið avtikið

**HERGEIR NIELSEN**



Føroyar hava havt skipaðar og greiðar mannagongdir við at játta pening til landshúsarhaldið á fíggjarlóg.

Fólkavalda løgtingið hevur hesa heimild og eingin annar, og eingin útreiðsla kann gjaldast uttan heimild á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg.

Í bráðkomnum førum kann farast umvegis fíggjarnevndina eftir eykajáttan umvegis fíggjarnevndarskjal.

Játtanarskipanin er rímiliga greið hesum viðvíkjandi.

Løgtingið hevur fleiri ferðir viðgjørt mál um at lækka flutningskostnaðin 2007 hjá Strandfarskipum Landsins, og nógvar hugsanir eru tingmanna millum um hesi viðurskifti.

Eitt málið um at játta 5 mió.kr. til at lækka flutningskostnaðin 2007 varð samtykt, meðan fleiri mál um aðrar játtanir vóru feld.

Hóast løgtingssamtyktina, so hevur landsstýrismaðurin nú í eitt hálvt ár ligið oman á játtanini.

Mánadagin loyvdi eg mær eina grein um tað ótrúliga atgerðarloysi, sum valdaði í fleiri málum í Innlendismálaráðnum, eitt nú hesum viðvíkjandi, og dagin eftir varð málið lagt fram og viðgjørt á landsstýrisfundi.

Útvarpið veit so í dag at siga, at landsstýrið hevur viðgjørt fíggjarlógina 2008 og samtykt at lækka flutningskostnaðin fyri 2008.

Landsstýrið hevur sostatt tikið sær tær játtanarheimildir, sum eingin annar enn løgtingið hevur, og hevur sostatt framt eitt álvarsligt inntriv í játtanarskipan landsins.

Áðrenn løgtingið so mikið sum hevur fingið orðið fyri seg og enn minni tikið støðu til at játta peningin, hevur landsstýrið samtykt at gera eitt størri inntriv í komandi fíggjarlóg.

Um tað fær nakrar avleiðingar? Neyvan.

Lógin um ábyrgd landsstýrismanna hevur verið óvirkin so at siga alt valskeiðið, og við felags samtyktum á landsstýrisfundum er tann einstaki landsstýrismaðurin gjørdur ábyrgdarleysur.

Júst tí hættaði landsstýrismaðurin í Innlendismálum sær ikki at avgreiða málið, og júst tí varð tað samtykt á landsstýrisfundi, har eingin einstakur landsstýrismaður hevur ábyrgdina.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.